## Liðformaðurin stríðist fyri plássinum

**HB skal royna seg í nýggjari útgávu, og í Fuglafirði eru fýra klaksvíkingar við í kappingini um plássini**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Nýggja HB ættarliðið skal í fyrstu týdningarmiklu royndina í Fuglafirði sunnudagin. Í steypasigrinum móti VB/Sumba síðsta leygardag var liðformaðurin, Janus M. Joensen, ikki tøkur. Nú er hann við aftur. Men tað er ikki púra givið, at hann fær plássið í vinstra verjuborði, tí avloysarin, 18 ára gamli Poul Thomas Dam (lítli beiggi hjá Jan C. Dam), hevur staðið seg ógvuliga væl.

Sammett við síðsta leygardag er Vagnur Mohr Mortensen tøkur aftur. Hann verður í miðverjuni saman við Rasmusi Nolsøe. Kári Nielsen er leikbannaður eftir útvísingina síðsta leygardag, so talan verður um kapping á miðvøllinum millum ungar og í fremstu røð lítið royndar miðvallarspælarar.

Verjuspælararnir Áki Petersen og Jonn Thomsen eru skaddir og hava ikki vant í Fuglafirði í hesum mánaðinum. Merkisvert er tað, at fýra klaksvíkingar eru við í kappingini um plássini á besta ÍF liðnum. Tað hevur fingið altíð skemtingarsomu klaksvíkingarnar og fuglfirðingarnar at kalla felagið í Fuglafirði fyri KÍF! Umframt Karstin Joensen í málinum eru teir Tórur Lervig, Julian Samuelsen og Arnhold Joensen. Teir vóru allir á vøllinum síðsta leygardag, tá ið ÍF á Svangaskarði misti plássið í steypakappingini.

## VB uttan málrevin

**Tað líkist slagið millum tveir dumpikandidatar í Gøtu**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Birgir Jørgensen verður ikki á liðnum hjá VB, tá teir sunnudagin fara undir ársins fyrstu uppgávu, sum verður í Sarpisgerði í Gøtu.

Birgir fekk reytt kort, tá VB mátti lúta fyri HB í steypakappingini, og soleiðis er hann longu nú leikbannaður.

Hjá GÍ eru eingi leikbann, men ivamál eru tó um tveir spælarar. Hanus Jacobsen og Poul Ennigarð hava báðir smærri snuddir at dragast við, og tá vit seinast frættu, var enn ikki greitt, hvørt teir munnu verða tøkir til dystin sunnudagin.

## Báðir partar bíða eftir loyvum

**Útlendskir trumfar hjá bæði EB/Streymi og B68 verða noyddir at sita uttanfyri, og hjá B68 eru tveir spælarar leikbannaðir**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Eftir eitt ára fráveru skal B68 royna seg fyri fyrstu ferð í FORMULA DEILDINI, tá ið toftamenn sunnudagin fara at vitja á Mølini.

Hjá B68 eru bæði Øssur Jacobsen og Jóhan Petur Poulsen leikbannaðir, eftir at teir sóu reytt, tá ið B68 síðsta leygardag sendi ÍF úr steypakappingini. Av Toftum verður sagt, at teir rokna ikki við at nýggi hollendski verjukendi miðvallarin, Ralph van Dooren verður tøkur. Loyvini vóru ikki komin upp á pláss fyrrapartin í dag.

Øssur Hansen noyddist av vøllinum eftir fyrra umfarið móti ÍF. Hann hevur vant í vikuni og fer at spæla á Mølini.

Á Mølini stendur væl til. Tað er stór kapping um plássini á besta liðnum. Rafal Kwiecinski, ið er álopskendur spælari úr Póllandi, sum tað verður roknað nógv við, verður neyvan við móti B68. Fyrrapartin í dag vóru loyvini ikki komin upp á pláss. Knút Vesturtún hevur verið smáskaddur, og tískil hevur hann ikki vant við fullari ferð. Eftir at hann hevur verið skaddur, hevur Ronnie Samuelsen í hesi vikuni vant við fullari ferð.

# Knallhørð byrjan á Skála


*Í fjør megnaði B36 at venda 0-2 til 2-2 á Skála. Eitt úrslit, sum var týdningarmikil partur av góða kappingarárinum hjá liðnum*

**Hóast umskipanir hjá báðum teimum fremstu frá í fjør, so eru ráðini til royndir ikki tey heilt stóru, nú Skála og B36 hittast longu fyrsta umfarið**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað eru føroyameistarar móti silvurvinnarum longu í fyrsta umfarinum, tá B36 sunnudagin vitjar á Skála.

Men hóast bæði liðini aftur verða mett millum teirra, sum av álvara kunnu gera seg galdandi, so er talan í ávísan mun um rættiliga hamskift lið.

**Seinni Skála-lið**

Hjá heimaliðnum eru tveir av heilt stóru profilunum ikki við í ár. Hanus Thorleifsson verður sunnudagin á vitjandi liðnum á Skála, meðan miðvallarmotorurin seinnu árini, Nenad Stankovic, ikki longur er í felagnum. Og hartil er Iulian Florescu heldur ikki at síggja. Allir profilar, sum kunnu verða tungir at missa - eisini hóast nýtt og spennandi fólk er sett ístaðin.

Tað merkir, at Skála ehlst noyðist at umstilla sítt spæl nakað, soleiðis at tað kanska ikki gongur heilt so skjótt fyri seg, tá farið verður niðan eftir vøllinum, samstundis sum tað eisini ræður um at finna nýggjan makkara til Paula G. Hansen á sentrala miðvøllinum.

Verður tosað um fráveru, er Bogi Gregersen einasti Skála-spælarin, sum er eitt lítið sindur ivasamur, men roknað verður tó við, at hann er tøkur.

**Kvikari B36-lið**

Hjá B36 hevur broytingin kanska verið hinvegin. Sum meistarar skeyt liðið óvanliga fá mál í fjør, men hinvegin syrgdi krútsterka verjan - og málverjin - fyri, at gullið hóast alt kom til høldar.

Missurin av Pól Thorsteinsson í verjuni og Inga Højsted á miðvøllinum tykist hava tikið nakað hesum verjustálinum úr liðnum. Men við tilgongdini av spælarum sum Hanus Thorleifsson og Sylla A. Davy eru fortreytirnar fyri kvikum kantspæli betraðar munandi. Eisini hóast Bergur Midjord framvegis er skaddur, eins og felagið hevur havt frágongd av nøkrum spælarum, sum kunnu røkja kantplássini.

Men hvussu alt hetta fer at ávirka avrikini hjá liðunum báðum, er so ein annar spurningur. Og hann verður ikki svaraður fyrr enn sunnudagin.

# Nú skulu verjurnar vísa sína styrki

**Serliga í Runavík hava teir nógv fokus á, at færri mál skulu fara ígjøgnum, enn tað fóru í fjør**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað fóru ov nógv mál ígjøgnum í fjør. Tað var høvuðsorsøkin til, at tað ikki samantalt hilnaðist betri, enn tað gjørdi í fjør. Hetta hevur verið niðurstøðan í Runavík, og teir ætla sunnudagin at vísa, at tað við Pól Thorsteinsson sum nýggjum manni í miðverjuni, skal eydnast betri at halda tætt.

Fyrstu løtuna í steypadystinum í Sørvági síðsta leygardag var tað ikki so væl skipað í verjuni, men tað batnaði, og tá ið Christian Høgni Jacobsen var í hopla og skoraði trý mál, var eingin ivi um sigurin.

KÍ hevur ikki rættuliga roynt seg enn. Steypadysturin síðsta leygardag varð avlýstur, tí mótstøðuliðið hevði gjørt sama brølara, sum klaksvíkingar gjørdu í steypakappingini í fjør.

Í Klaksvík eru teir spentir at síggja, hvussu tað fer at hilnast við broyttu uppstillingini, har tað eru tríggir í miðverjuni við Atla Danielsen sum aftasta manni, og hvussu tað fer at eydnast hjá nýggja makkaraparinum í álopinum. Teir eru Ovi Nysted og kanska unglingurin Steffan Kalsø, sum er spildurnýggjur á besta liðnum. Annar møguleiki í álopinum er Paul Clapson, sum í venjingardystunum viðhvørt hevur verið málverji og viðhvørt hevur verið í álopinum.

Veteranarnir Marek Wierzbicki og Harley Bertholdsen, sum ikki spældu so nógv í fjør, tykjast skula vera millum teir fyrstu ellivu, tá ið KÍ og Tony Paris í Runavík skulu taka fyrsta stigið móti stóru visiónini. Heðin á Lakjuni hevur trupulleikar í knænum orsaka av skadda krossbandinum, men hann verður við í KÍ ferðalagnum í Runavík. Iulian Florescu hevur av persónligum ávum verið heima í Rumenia í nakrar dagar, men tað verður roknað við, at hann kemur aftur til Klaksvíkar í morgin.

Sinisa Milisevic, verjukendur serbi, hevur vant í Klaksvík seinastu vikurnar. Hann verður tó ikki við sunnudagin, tí loyvini eru ikki komin upp á pláss.

Hjá NSÍ er sera stór kapping um plássini millum teir fyrstu ellivu. Málið er at vinna fyrsta FM heitið nakrantíð til felagið, og venjarin heldur bæði seg sjálvan og spælararnar at vera førar fyri at liva undir trýstinum, sum er á felagnum.

Í Sørvági vóru Viggo Johannesen og Helgi L. Petersen uttanfyri orsaka av skaða. Teir eru tøkir hesa ferð. Spæliloyvið hjá Jóhan Troest Davidsen var ikki komið upp á pláss tíðliga fyrrapartin í dag.